Toftarannsóknir í Fuglafirði.

Eftir *Sverra Dahl.*

LANDSLAGSLÝSING

Bygdin í *Fuglafirði* stendur sum í einum potti; frá botninum reisa fjøllini seg sum ein 500–700 m høgur garður aftanfyri og uttan um bygd og fjørð og steingja fyri øllum útsýni – eisini til havs. Uttanífrá, frá *Leirvíksfirði* og *Djúpunum*, sæst fjarðarmunnin men eingin bygd; hon er væl fjald innast í fjarðarbotninum, sum nú er albygdur.

Visti tú ikki betur, hevði tú hildið hetta verið heldur unga niðursetubygd, so bondskliga er nútíðin farin fram móti teirri eldru búsetingini. Gamlir bústaðir eru núverandi býlingarnir í *Toftum* eystast við *Skarðsá*, onnur stóráin, ið rennur oman gjøgnum bygdina, *uppi við Garð* í miðjuni og *heima við Gjógvará* vestast við hina stóránna, *Gjógvará*.

Har Gjógvaráin kemur oman á toluliga slætt, hevur hon gjøgnum tíðirnar lagt frá sær mikla oyri, ið hevur givið lendinum har um vegir navnið *(heima) á Oyrini.*

Fyrr hækkaði lendið báðu megin ánna líðandi niðan frá sandoyrini; nú er lágur bakki fyri, áðrenn valling tekur við. Vallaða økið eystan fyri ánna er slættari og víðari enn vestanfyri, og har er tað, at toftirnar, sum her skal verða greitt frá, vórðu funnar.



Við loyvi frá Geodætisk Institut.

1. mynd. Fjarðarbotnurin, tikin frá flogfari, sæddur sunnan. Rannsóknarøkið í miðjuni innan fyri hvítu klingruna.

Bird's-eye view of the bottom of the fiord, seen from south. In the middle of the picture, within the white circle, the area of investigation.

RANNSÓKNIN

Forsøga.

So langt aftur í tíðina, sum gamlir menn minnast, hava her *heima á Oyrini* staðið hoygarðar, køstar og hjallar. Seinastu hjallarnar tók stakhvirla allar av grund í mars 1955.

Poul Petersen, skipari, ætlar at byggja ein hjallin upp-

aftur, og nú hann, várið 1957, grevur fyri grundini, kemur hann á ymist, sum sýnist at vera gamlar toftir. *Herluf Berthelsen*, skrivari sóknarstýrisins, boðar 7. juni sama ár Fornminnissavninum frá hesum.

Dagin eftir varð farið norður, hugt varð at tí, ið funnið var: *laðað grót, eitt spjaldur við búmerki (?), 2 bátaborð og nakrir bitar av «viðjabondum»*.

Við vón um at fáa gjøllari greiði á málinum, varð nú grivið í landnyrðingshorninum á útgrivna økinum og komið beint á sunnara enda av eldstaði o. u. 1 m undir svørðinum; upp aftur djúpari vórðu funnin tilevnað fitisteinsbrot.

Nú vissa var fyri fornum toftum á staðnum, samtykti landsstýrið at friða lendið til seinri rannsóknar.

Rannsóknin kom í lag summarið 1958.*) Skjótt vístu toftaleivdirnar seg at vera størri og meira umfatandi enn í fyrsta umfari mett. Fyri eystan fóru tær inn undir grundøkið hjá *Trónda Johannesen*, sum vinsamliga gav loyvi at grava eisini har; fyri sunnan var so nógv burturbeint av gravingini fyri grund, at ikki loysti seg at gera meira har enn grava gryft allan vegin oman til sandoyrina; fyri vestan stóðu úthústoftir og nýtt hoyggjhús ella hjallur, ið forðaðu; fyri norðan var akvegur, sum grivið varð niðan í so langt sum gjørligt. Hetta, og ravmagnssteyrur, sum seinri vísti seg at standa omaná gomlum toftaveggi, er atvoldin til, at útgrefstrarmarkini eru so sum tey eru (2. mynd).

Mátingar.

Settar upp vórðu *mátingarlinjur kumpasrætt N.-S. og E.-V.* N-ørvin á tekningunum er misvísandi norður. Sum fast hæddarmerki er nýtt *gjarmarkið, hálvfløddur sjógvur.*

Við tað at ikki hevur ligið fyri at fáa skurðtekningar

*) Hjálparmenn vóru eitt skifti fyrst *Peter Petersen*, stud. theol., seinri *Arne Thorsteinsson*, stud. mag.

við í hesi grein, vilja vit, har tað tykist neyðugt, nevna *hæddartalið* og gera vart við, at tað merkir *mátaða hædd yvir sjóvarmálan, miðalflóð í dag.*



2. mynd. Flatatekning av húsi VI og VIII við eldstøðum 5 og 4.
Plan showing houses VI and VIII with fireplaces 5 and 4. Key (downwards): pallur: benches along the walls; stólpi: posts; veggjajaðari: wall; renna: drain; útgrefstrarmark: edge of excavation; klettur: boulder; jarðklettur: rock.

Toftaleivdirnar.

Niðast vinstrumegin á 2. mynd sæst ein stórur jarðklettur; frá honum yvir móti útgrefstrarmarkinum við klettin høgrumegin og oman suður móti sandoyrini er tað økið, sum Poul Petersen hevði grivið fyri grund. Nú hetta varð reinsað, vísti seg, at sunnari endi av tí eldstaði, ið funnin varð árið fyri, bara er 27 m niðan norður frá sjóvarmála niðri á sandinum og 6,5 m frá vallaðu bakkatromini.

Tvør- og longdarskurðir vístu, at svørðurin her var o. u. 3,20 m yvir sjóvarmála; undir honum var mold, sum varð meira og meira mókend, tess djúpari komst; í mókendu flónni vóru skilligar lindir av fínum sandi, øsku og træsprekum. Greitt var beinan vegin, at her máttu vera 2 ella 3 ymsar búsetingarfláir. Seinri kom í ljósmála, at í øllum hesum fláum hevur verið bygt um og uppí ferð eftir ferð, so ilt var at hava skil á toftaleivdunum.

Einastu heilt vissu eru tær niðastu, ið vit her hava nevnt: hús VI, VII og VIII.

Hús VIII, 2 mynd. Niðan norður frá áðurnevnda jarðkletti hevur upprunaliga verið eyrryggur, við halli oman móti Gjógvará, og óivað eystureftir eisini, soleiðis at eystanfyri hann og jarðklettin var lítil lægd, sum menn hava kosið sær at seta hús síni í. Fyri at spara sær arbeiði, laða teir vestara veggin á eyrryggin norður frá jarðklettinum og niðan móti og framvið øðrum jarðkletti, einar 8 m longur uppi. Tað sum á tekningini sæst er støðið á tí 1,25 —1,5 m tjúkka ífyllingarveggi, ið vit vita hevur verið 1 m høgur frá niðastu gólvskón til hægstu varðveittu ífyllingarsteinarnar. Men ivaleyst var hann upprunaliga væl hægri, í minsta lagi eins høgur og jarðkletturin, (+ 3,34 m) ella o. u. 2 m.

Norðurveggurin var allur rapaður, men grundarlagið púra greitt; hesin veggur og tann vakurt bendi eysturveggurin, sum eisini er laðaður oman móti einum kletti, eru eisini skill-

igir ífyllingarveggir. Av eysturveggi standa 2–3 umfør uppi, einstakir steinar eru glidnir inn, men annars er hann ikki avlaðaður. Hæddin er yvirhøvur o. u. 0,35 m.

Eingin ivi er í, at jarðklettarnir hava verið laðaðir inn í veggirnar, sum so mega hava rokkið longur oman enn tekningin vísir. Tó at vit ikki hava sæð teir, tora vit at siga tað, av tí at gryft gjøgnum alt lendið suður til sandoyrina í støðum vísti skilliga gólvflá oman frá jarðklettinum til fyrr umrøddu vallaðu bakkatromina.

Alt grótið í laðingunum er beringagrót, tað nógva rundbøllingar, og til ífyllingar er nýtt mold og smásteinar. Í moldini millum umførini, serliga í eysturveggi, var so mikið av (træla)mosa, at spurningur er um menn hava laðað við gróti og flag ella hava stungið veggjarholurnar við mosa.

Rannsakaði parturin av toftini er o. u. 10 m langur, 5,35 m breiður, innan, um miðjuna, og 3 m breiður, innan, við norðurveggin.

Sum vit longu hava nomið við, hevur hon ivaleyst verið longri; og bera vit hesa toft, sum er ein høll eins og tann í Kvívík, saman við hana, má henda hava verið 16–17 m long innan, tá ið hon øll stóð uppi. Hon hevur við øðrum orðum rokkið so langt oman, sum vallað er í dag.

Meðan norðurveggurin er beinur, síggja vit, at síðuveggirnir serliga tann eystari eru bogaðir, so at húsini eru breiðast á miðjuni, haðan tey líðandi smalka móti báðum endum. Grundarlagið kemur tí at líkjast holvdum báti, sum skutirnir eru kvettir av.

Áhugavert er at bera hetta byggilag saman við samdømi í hinum Norðurlondum, t. d. Oma í Noregi[13], Ísleifsstaðir í Íslandi[7], Trelleborg í Danmark[11] og Kvívík[3] hjá okkum. Minni forvitnisligt er ikki at meta omanfyri nevndu longdar- og breiddarmát her við somu tøl í stóru húsunum í Trelleborg[11] og Kvívík[3]; vit síggja tá, at lutfallið millum breidd á miðjuni og við endarnar er beint tað sama, og at lutfallið millum øll longdarmátini samsvarar ógviliga nær. Hetta er meir enn merkilig tilvild.

Eitt sindur norðan fyri miðjuna á høllini gongur áður nevndi eyrryggurin inn í húsini. Hann er vorðin snøggaður framman og síðan havdur sum partur í palli, ið annars er innan fyri veggirnar allan vegin runt.

Oman úr eyrrygginum og framvið vesturvegginum er grivin veit, ið síðan er steinsett sum renna við hellulokum; henda renna er samstundis støði undir forsíðu pallsins á hesum strekki.

Øll toftin er bygd á feitt, grønt leir; tað grava teir upp og nýta sum ífylling í pallin á hesum staði. Bæði renna og pallur eru gjørd beint á gamlan svørð; í uppskumpaða leirinum sóust skilligar moldskeinur, ið trúligast eru leivdir av elsta svørðinum. Annars er tann 0,5—1 m breiði og ætlandi 0,35 m høgi pallurin gjørdur á tann hátt, at grótstøði er lagt allan vegin runt innanfyri veggirnar og rúmið fylt við mold og heldur grovum eyri. Teir støðissteinar, sum ikki eru teknaðir á 2. mynd (ovast høgrumegin) vóru av misgávum tiknir burtur, áðrenn teknað varð. Niðan eftir øllum eyrrygginum er pallsjaðarin lagdur av nevastórum malargróti; hvat ið hevur verið oman á og framman fyri pallarnar sigst einki um við vissu, men tær nógvu træleivdir her, serliga á og við eystara pallin, kundu víst á klæðing úr viði.

Sand- og øskublandaðu gólvlindirnar, svartar og feimnar av ími, eru fleiri. Tann niðasta er ógviliga hørð serliga uttanum eldstaðin, ið stendur eftir miðlinju húsanna og vendir í *sannan útnyrðingnorðan—landsynningsunnan*. Hetta er 4,75 m langur, o. u. 0,7 m breiður langeldur við 1 m langari, 0,45 m breiðari, 0,17 m djúpari, ferhyrndari kullu í miðjuni, sum óivað eisini er *miðja hallarinnar* (eldstaður 4). I kulluni var einki uttan leys, turr øska, døkkari og ljósari á liti. Uttan um kulluna, eins og rundan um eldstaðin allan, er umgerð av longum, mjáum malargróti; annars er langeldurin hellusettur. Fyrsta gólvið hevur verið munin lægri enn umgerðin; og hellurnar, ið hava nakað sama hallið oman eftir sum gólvið, liggja eisini eitt sindur

lægri enn umgerðin yvirhøvur. Hæddartal á umgerð um kulluna + 1,45 m, á kullubotni + 1,28 m, á hellum norðanfyri + 1,55 m, á hellum sunnanfyri + 1,35 m.

Eystan fyri eldstaðin stendur rað av smáum malargróti fast í gólvinum; helst leivd av palli, eldri enn tí fyrr umrødda.

Við tað at lendið vestanfyri, millum jarðklettanna, og norðan fyri er hægri enn hitt, hevur vatn sett inn, tí eru rennur lagdar inn undir vestur- og norðurveggin, haðan tær fara tvørturum og oman gjøgnum alla høllina. Hvussu hesar rennur eru gjørdar sæst tvær staðir í tvørrennuni, har hellulokini vóru gliðin út av. *2. mynd.* Á myndini síggjast eisini allir stólparnir, sum við vissu hoyra til hesi hús; prógvini eru í tí, at teir ikki dagaðu undan fyrr enn í niðastu gólvfláarhæddum fyri ein part undir steinum, ið hava verið nýttir í ovaru toftum.

Millum hesar, yvirhøvur 0,20 m tjúkku, rundu stólpar, eru 2,25—2,75 m, sum teir standa í tveimum røðum niðan gjøgnum alla høllina og soleiðis gera hana trískipaða. Hvussu nógvir, ið vóru, vita vit ikki; 7 eru til og støðið av tí 8., fløt hella sum lá órørd í legu uppi móti landnyrðingshorninum. Allir vóru stólparnir fúnaðir, summir bara varðveittir sum ljósbrúnur greytur, men kortini skilligir og púra vissir, eisini av tí, at smáklípur eru kúgaðar niður rundan um teir.

Hesir stólpar hava borið tekjuni, ið óivað sum siður var fyrr, hevði mønutráðu, og eisini man hava verið hægst á miðjuni, haðan hon lækkaði móti báðum endunum, til tess at hon skuldi ikki ríva. Sama tekingar- ella tyrvingarlag vit enn stundum nýta á úthúsum og kráum.

Dyr eru ongar funnar; eg giti, at tær vóru út móti Gjógvará sunnanfyri jarðklettin, soleiðis at niðara síða hansara var norðari durastavurin.

Sum tíðin líður verður sandur ferð eftir ferð borin inn á gólvið. Tá ið gólvið er hækkað einar 0,20 m upp um tað fyrsta, gera teir nýggjan eldstað; harafturat tykist sum



3. *mynd.* Flatatekning av húsum VI og VII við eldstøðum 5 og 2 og øllum smástólpum settum inn her, av tí at ógjørligt er við vissu at gera av hvørjir hoyra til hús V og hvørji til hús VII.

Plan showing houses VI and VII, with fireplaces 5 and 2 and all small posts sketched in here as it is impossible to make out with certainty which belong to house V, and which to house VII. Key (downwards): stólpi: posts; smástólpar og -hol: small posts and holes; rennilok: drain cover; veggjajaðari: wall; útgrefstrarmark: edge of excavation; klettur: boulder; jarðklettur: rock.

steðgur er komin í gólvhækkingina har eitt bil. Her + 1,58 m er aftur heldur hørð gólvskón og 2,2 m langur, 0,75 m breiður eldstaður (eldstaður 3). Hann stendur beint oman á hinum og vendir sama veg, men er styttri N.—S. er hin. (4. mynd, nr. 3). Hann er eisini laðaður av hellum við umgerð av fløtum steinum, ið standa upp um botnin, ið er 1,52 m yvir sjóvarmálan.

Gripir í húsum VIII.

1. *Brýni;* úr glitur- og leirskifuri, summi hava foyrur eftir brýning av spískum jørnum ella nálum; eitt beltisbrýni, heilt, úr leirskifuri, er 10 cm langt, 1 cm breitt, 0,7 cm tjúkt. (funnið millum eldstað 2 og 3).
2. *Fitisteinsílátabrot;* fleiri hoyra saman, øll av bollum; eitt av 1,8 cm tjúkkari, flatari trom, veggjatjúkd yvirhøvur 2,2 cm; eitt annað, eisini av, 1,4 cm tjúkkari, flatari trom, hevur hjóling undir tromini uttan; 2 cm tjúkt um brúnina, haðan búkut, helst brot av stórum bolla. Leirílát við sama sniði í *Kvívík*[3] smb. *Trelleborg*[11], *talva XVII.* (funnið á eystara palli).
3. *Metal;* tráðir og rundar boygdar stengur, ið hava verið í eldi (í gólvskón við langeld 4).
4. *Handsnældurennlar;* úr fitisteini, flatir báðumegin, ímutir øðru- ella báðumegin, evnaðir úr ílátabrotum; tvørmát yvirhøvur: 2,8 cm, hædd 1,6 cm (ymsar staðir í gólvi og á pallinum).
5. *Handsnældurennlar* úr royðugróti, flatir og íflatir undir niðan, árundir omaná; ein er so lítil at hann heldur man vera 0,7 cm høg perla; ein, o. u. hálvur, er brotnaður so at eygað er burtur; tó at hann er størri enn vant man hetta kortini vera rennil, íflatur undir niðan við sneiddari rað, árundur omaná, tvørmát 7,6 cm, hædd 3,1 cm (í gólvskón undir «bríkarsteini» eystanfyri eldstað 2).
6. *Handsnældurennil;* úr blýggi, (kanska lodd?); tvørmát 2,2 cm, hædd 0,7 cm.
7. *Træamboð;* runt skaft, ið líðandi breiðkar út í tunt flatt blað, 3,5×3,2×0,2 cm, ið øðrumegin er rundað, øðrumegin telgt á skák við hvøssum eggjarni; øll longdin 13,8 cm. Amboð ella leika ?, ið líkist nógv einum slagi av fornum spakum[14]; (í niðastu gólvflá + 1,50 m).

8. *Træsprek;* meiri og minni tilevnað; eitt lítið kelvi við ferhyrndum haki beint á miðjuni, 5,5 cm langt, tvørmát 1 cm (funnið millum eldstað 2 og 4); nøkur eru evnað sum blóðmørspinnar 12,7–18,7 cm langir, 0,7–1,1 cm tjúkkir um bíska endan.

9. *Træílát;* eitt er oysa, kleimd saman, men kortini ikki meira enn at skapið sæst, o. u. 19 cm long, sbr. *Nørlund*[10]; eitt er holað egg-klingrut, 12,1×7×3,5 cm (á eystara palli).

10. *Leika? talvfólk?;* tinna, blonk og fløt undir niðan, ruflut og árund omaná, tvørmát 2,1 cm.

4. mynd. Høllin kemur undan. Høgrumegin hús VII við flata «bríkarsteininum» eystan fyri eldstað nr. 2, undir honum sæst á eldstaðirnar 3 og 4. Vinstrumegin gólv og rennulok í húsi VIII og støðið palls og vesturveggs.

The hall becomes visible. To the right, house VII with a flat stone seat east of fireplace 2; in the foreground, fireplaces 3 and 4. To the left, floor and drain cover in house VIII, and sites of benches and west wall.

11. *Svørðslutur;* skefti úr viði, leika; av brandinum er bara evarslítið eftir, og flísar eru brotnaðar bæði av undir- og yvirhjalti. Tess torførari er tað at sammeta við rættuligu svørðini; eftir fundumstøðum og -samanseting verður kortini borið saman við *Jan Petersen*[12] (bólk L). Øll longdin 7,3 cm; yvirhjaltið, knøtturin, 1,8 cm

breiður; av undirhjalti, ið er eggklingrut, 0,9 cm høgt, 0,5 breitt á miðjuni, eru av longdini varðveittir 1,8 cm (á eystara palli + 1,53 m). 7. *mynd.*

12. *Fjøl, ískorin:* brotnað er av øllum 4 síðum; nú 14,7 cm breið, 11,8 cm høg, 1,7 cm tjúkk; upprunalig stødd helst, 16×16 cm. Í tveimum mótsettum endum sita 2 trænaglar. Fjølin man vera lok ella galvur á eskju ella kistli. Øðrumegin er skorin bandflætta av rundaðum tvíbondum; skilligt er, at hvørki er serliga væl ella rætt skorið; brek eru í og skurðlinjurnar ójavnt djúpar.

Hetta er gamalt motiv, ið hevur verið nýtt langt upp í tíðina, eisini hjá okkum. Kortini noyða fundumstøðurnar at meta tað saman við tey mongu fornu dømi, ið til eru, serliga her vesturi í havi[6, 12, 16, 17]. (funnin í niðastu gólvflá + 1,50 m). *8. mynd.*

13. *Ílátastavur;* laggaður, 1,4×5×0,7 cm (+ 1,50 m).
14. *Klíggjasteinar;* til vev, úr fitisteini; annar ímutur øðrumegin, evnaður úr grýtubroti, 9,7×6,1×3 cm; sbr. *Jan Petersen*[14] *bls. 297, mynd 159.*
15. *Klótuangi;* telgt hol gjøgnum annan endan, 45×12×6,7 cm.
16. *Kvarnarsteinur;* úr føroyskum gróti, nógvar flísar brotnaðar av, nú tvørmát 45 cm, hædd 9 cm (í gryftini suður gjøgnum toftalendið).
17. *Vaðsteinur;* úr malargróti, 12,8 cm langur, 9 cm breiður, 7,6 cm tjúkkur; longdarfoyra allan vegin runt í mjásíðunum, í aðra breiðsíðu er høgdur krossur við eins longum ørmum, í hina bandknútur. *9. mynd.*
18. *Perlur;* úr glasi; ein úr royðugróti? sí: VIII, 5. 2 glasperlur eru gular við svørtum spølum, tvørmát 0,5 cm, hava møguliga verið tvífaldar eins og 2 bláar, tvørmát 0,7 cm (allar funnar á pallinum og kunna tí hoyra til hús VII) sbr. *Kvívík*[3], *12. mynd.* 1 lítil grøn, tvørmát 0,4 cm, ið eisini er funnin á (eystara) palli er uttan iva úr húsi VIII; hæddartal + 1,27 m.
19. *Greinar við børki á* (ikki gjølla kannaðar).
20. *Viðjabond.*
21. *Nævurskrukkur.*
22. *Flint; ein heldur stór flís* (funnin undir «bríkarsteininum» við eldstað 2)

Hús VII, 3. mynd. Hetta eru í roynd og veru somu húsini sum høllin, hús VIII, vit hava hoyrt um. Tá ið tey kortini hava fingið frámerki, er tað tí, at tey umboða heilt nýggja fundfláarhædd við egnum gólvi og eldstaði. Kortini er eingin ivi í, at fólk hava búð innanfyri somu veggir langt tíðarskeið uttan íhald.



5. mynd. Flatatekning, ið vísir, hvussu tær ymsu toftaleivdirnar stóðu omaná og í hvørji aðrari.

Plan showing the different remains of sites (see summary). Key (downwards): houses I, II, III; house IV; house V; houses VI, VII, VIII. Lyktarsteyrur: lamp-post.

Høvuðsgólvið í hesum húsum er 0,3—0,4 m ovari enn tað niðasta í húsum VIII; eins og tað er hetta hægst í norðara parti og lækkar, sum undirlendið ger tað, líðandi omaneftir. Tilfarið er øskublandaðar sandlindir, mest heilt fínur sandur, summar staðir eyrur.

Víða um á gólvflánni og í henni lógu viðarsprek, sum hond hevði verið á, men ongar staðir soleiðis at vissa er fyri, um tey vóru leivdir av brósti, tróðri ella pallstokkum. Sumt er óivað av tekjuni; tí omaná øllum gólvinum var ymisk tjúkk mosa- og grasflógv við træsprekum í, sum ikki væl kann vera annað enn inndottin tekja og sigur frá, at húsini hava ligið sum toft ta langa tíð, at mosi og gras hava funnið vakstrarlíkindi har.

Fáu stólparnir, 0,1—0,2 m tjúkkir, ið við vissu hoyra til hesa gólvhædd, eru allir evnaðir úr stokkum, men høgdir flatir á síðunum, ið venda norður og suðureftir; hetta sermerkið kundi boða frá, at húsini hava verið býtt sundur í fleiri rúm við skilarúmum úr viðið; men nakað víst sást ikki til hetta. Summir av teim o. u. 0,05 m tjúkku smástólpunum og tómu smástólpaholunum kundu bent á tað. Summi smástólpahol, vórðu greiðari tess djúpari komst, einstøk funnust aftur í niðasta gólvi. Við tað at ógjørligt er at gera av til hvørja av toftunum teir hoyra, eru allir teknaðir inn á flatatekningina av hesi gólvhædd, *3. mynd.*

Eftir miðlinju húsanna og beint omaná hinum eldstøðunum stendur vakri langeldurin, sum funnin varð í 1957, og sum vit nú rópa eldstað 2; hæddartal + 1,75 m. Hann er 3,5 m langur, 0,5—0,9 m breiður, laðaður í og á gólvið av hellum, ið nú flestar eru brostnar og alreyður av hitanum. Uttanum hann er eingin grótumgerð men tjúkt av øsku, við torvkonglum, brendum beinmolum, trækoli, óbrendum telgdum træpettum og ymsum búnýtabrotum (4. mynd, nr. 2).

Tætt eystanfyri langeldin lá snøggur, flatur, ferhyrndur steinur, møguliga «bríkk», og eysturfrá honum annar flatur, men ósnøggari steinur.

Tá ið hesir steinar vórðu tiknir upp, lógu undir teimum ymsir gripir, sum mega hoyra til niðaru toftina, t. d. stóri rennilin (hús VIII, 5). Sama hendi, tá ið langeldurin varð tikin burtur; undir norðara parti av honum, niðan frá eldstaði 3, vórðu funnin: flintpetti, tilevnaður smálutur úr viði (VIII, 8) og vakurt, heilt beltisbrýni (VIII, 1).

Innanfyri vesturveggin er renna oman gjøgnum gólvið; tað sær út sum hon hevur haft samband við tvørrennu av sama slagi og á sama staði sum tann í høllini; men yngri byggitiltøk hava órógvað hana so nógv, at rættiligt skil ikki fekst á hesum. Ivasamt er eisini, um pallarnir hava verið nýttir eisini her, ella um gólvið, so sum tað í støðum sýntist, lá omaná teimum.

Gripir í húsum VII.

1. *Leirílátabrot;* nøkur fá óglarað; eitt av innábendari trom, ímut uttan, er helst av bolla, sbr. *Kvívík*[3].
2. *Brýni;* úr gliturskifuri, 6,4–19,7 cm long.
3. *Viksteinar;* slitnir, havdir til eitthvørt; tann størsti 7,5×5,5×4,7 cm.
4. *Handsnældurennlar*; úr fitisteini, flestir flatir undir niðan, árundir omaná, ein flatur báðumegin, ein toppvaxin. Ein hevur ímskón, gjørdur úr ílátabroti. Tvørmát 2,2–4,3 cm, hædd 0,8–2,1 cm.
5. *Handsnældurennlar;* úr royðugróti, flatir undir niðan, flatir ella árundir omaná; tvørmát 3–3,8 cm, hædd 1,4–2 cm.
6. *Handsnælduskøft;* brotin, rund, tjúkkast: 1,1–1,3 cm nakað, á einum 4,2 cm, inn frá øðrum enda, haðan smalka og runda tey báðar vegir; tvørmát um nokkaendan 0,6 cm. Sama snið sum t. d. *Roussel*[16].
7. *Krintalsrennlar;* ein úr fitisteini, tvørmát 10,5 cm, hædd 2,3 cm; ein úr royðugróti, tvørmát 14,1 cm, hædd 5,3 cm.
8. *Fitisteinsamboð?;* runt fitisteinsbrot; í eina síðu er skorin 8 cm long, 2 cm breið, o. u. 1 cm djúp lægd; í eina 3,2 cm langur, 2,1 cm snøggur latínskur krossur, tætt við hann ein annar grynri og ósnøggari, umframt tvær foyrur.
9. *Fitisteinsílátabrot;* nógv, ímut uttan, 1,2–2,2 cm tjúkk; summi av trom, helst av bollum; eitt 15,5×11,4×1,6 cm stórt er av ferhyrndum stórum íláti við reystum síðum, *sbr. Grieg*[8].

6. mynd. Hús I sæð eystan.

House I, seen from east.

10. Træílát; laggaðir stavir 14,3–17,6 cm langir; og botnfjalir 14,8–18,0 cm í tvørmáti, 0,7–0,8 cm tjúkkar, í fleiri er skorið ella skøvað; í ein botn 4 sammiðjaðar klingrur. *sbr. Roussel*[16] *bls. 136, mynd 122.*

11. Træílát; holað úr einum viðarkubba, eitt er trog, klovnað eftir longdini, 32 cm langt; eitt annað heilt, men sera lítið, 15,5×6×2,8 cm; eitt 18,4×5,8×2,5 cm er meinlíkt *Jan Petersen*[14] *bls. 359, mynd 196.*

12. Træplátur; við nógvum smáum holum og skøvum; funnar saman vóru: 2 ferhyrndar, 4×4×0,3 cm, við spískum hornum og holi gjøgnum úti við hvørt horn, 1 sum hinar men við sneiddum hornum, 5,6×0,3 cm; og 1 (brotin) við 2 holum 12,7 cm long, 0,6 cm tjúkk.

13. «Viðjabond»; ymiskt long og tjúkk, snarað úr baraldarviðjum.

14. Træpetti; nøkur evnað sum blóðmørspinnar.

15. Klinkupinnur; 8,2 cm langur.

16. Eldkrókur?; bogavaxin grein við knøtti á øðrum enda og farvegi eftir telging ella sliti.

17. Soðspønir; ein sera vakurt evnaður við krossi í miðjum blaði, ið er sneitt og eitt sindur hjólað á ovaru, árunt á niðaru síðu. Skaftendin telgdur flatur á niðaru síðu og 2 hol borað í, óivað gjørt til tess at leingja skaftið, tá ið tørvaði. Øll longdin 37 cm, skaftið 2,9 cm tjúkt, blaðið 14–15 cm breitt, 1,5 cm tjúkt – 7. *mynd;* ein

við sama sniði men minni og við rundum holi í miðjum blaði, 17,6 cm langur, blaðið 7,7 cm breitt.

18. *Knarvar;* ein hevur hjólaðar endar; ein kílavaxin, er 7,2 cm langur, 2,6 cm breiður í øðrum enda, spískur í hinum, 0,7 cm tjúkkur.
19. *Leðurál;* óvist, farvegur av seyming sæst oman eftir miðjuni; 27 cm long, 7 cm breið.
20. *Jarnamboð;* rustað, ferhyrnt, veggvaxið jarnpetti; 14,5×5,2×2,7 cm.
21. *Vaðsteinur;* við longdarfoyru; 15,9 cm langur, 7,7×9,7 cm tjúkkur hvønn vegin.
22. *Steinkola;* rundur steinur, 12,7 cm langur, 12,0 cm breiður, 6 cm høgur, kulla er høgd í báðar breiðsíður, onnur væl størri enn hin.
23. *Metal;* 6,1 cm langt runt rør; niður úr tí 3 tungur, 0,8 cm breiðar, 0,2 cm tjúkkar, við holi gjøgnum; tvørmát á røri 0,8 cm.
24. *Hassilnøtur;* heilar nøtur og skøl.
25. *Nævurskrukkur.*
26. *Djórabein* (ikki gjølla kannað).
27. *Trækol.*
28. *Greinar við børki á;* (ikki gjølla kannaðar).
29. *Flint.*

Hús VI, 2. og 3. mynd. Norður frá jarðklettinum og vestur úr vesturvegginum á húsum VII og VIII er rúm bygt ájavnt við høllina. At tað er gjørt aftaná at vesturveggurin var laðaður, tóktist í fyrsta umfari ivaleyst, tí at laðingarhátturin, nýttur var í vesturvegginum, ífylling, er heilt annar enn hann í endaveggjunum, tvílaðing uttan ífylling av nøkrum slagi.

Eftir teimum royndum, ið enn eru gjørdar her á landi, tá ið talan er um forna veggjalaðing, skuldu ífyllingarveggir verið eldri enn tvílaðaðir. Men, tá ið allir hesir veggir verða tiknir niður á botn, var eyðsæð, at ytra skinn á vesturveggi er samfast við endaveggirnar; einki sást til brot ella samankoming og ikki annað enn at allir grundarsteinar vóru lagdir í senn; *3. mynd.*

Hvørt sum er, málinum slepst ikki nærri, tí av ymsum orsøkum bar ikki til at grava toftina út úr bakkanum. Gripirnir, ið funnir vórðu í gólvinum, siga heldur einki um tíð.

Kortini er ivaleyst, at hetta er 5,5 m long stova. Tætt

við vestara útgrefstrarbenið stendur 2,25 m langur, 0,75 breiður væl laðaður eldstaður, hædd + 2,15 — + 2,20 m. (eldstaður 5). Uttan um hann er steinsett tvær ferðir. Tann ovara steinsetingin er heldur óvandalig, tann niðara harafturímóti sjáldsama vøkur; hvørgin teirra gongur inn undir veggirnar, men báðar serliga tann niðara, laga seg snøgt inn móti øllum veggjum, fram um alt vesturveggjastøðinum. Ikki er gjøllari kannað, um niðara steinsetingin fer inn undir eldstaðin, soleiðis sum tað sýnist í tvørskurði. Omaná hesi steinseting var hørð gólvskón av fínum sandi, øsku og svartmold; her lógu teir flestu gripirnir.

Áhugavert er, at undir henni var mókend mold, øska, nøkur telgd træpetti og hópur av smáum, brendum beinmolum. Helst er hetta gamal svørður og leivdirnar burturkast úr húsunum vestanfyri (hús VIII), ið so mega vera eldri enn hetta rúm.

Hæddartalsmunur á gólvi í hesum rúmi + 2,04 m og gólvunum í húsum VII og VIII + 1,7 og o. u. + 1,4 m sigur einki; orsøkin er áðurnevndi eyrryggur millum niðara og ovara jarðklett (undir akvegnum), hann er hægstur her og lækkar hiðan bæði eystur- og vestureftir.

Undir mókendu moldlindini er grønt, feitt leir, sum sæst aftur allar staðir undir veggjum, rennum og niðasta gólvi í húsum VIII.

Gripir í húsum VI

1. *Brýni;* úr glitur- og leirskifuri; 7,5—27 cm long.
2. *Handsnældurennlar;* úr fitisteini, ein við krossarmerki undir niðan; flatir undir niðan, árundir omaná; tvørmát 2,8—4 cm, hædd 1,1—2 cm.
3. *Metalspenni;* lítið, eggklingrut við 4 smáum holum í hornunum.
4. *Fitisteinsílátabrot;* nógv smá og størri brot, ímut uttan; eitt av trom, ið er fløt, niður frá henni tykist vera hjólað. (sbr. hús VIII, 2). Yvirhøvur 2,2—2,9 cm tjúkk.
5. *Træpetti;* nógv, eitt er 5,5 cm langur trænagli.
6. *Djórabein;* hópur av brendum beinmolum (ikki gjøllari kannað).



Svend Poulsen.

7. mynd. Svørðslutur (vinstrumegin) úr viði, ivaleyst leika (hús VIII, 11), stødd 4:5; soðspónur (høgrumegin) (hús VII, 17), stødd 1:4.

Left: part of wooden toy sword? (house VIII, 11), 4:5; right: skinner (house VII, 17), 1:4.

Hús V, 5. mynd. Tað tóktist sum vesturveggurin var laðaður á tann hátt, at tvey skinn gingu oman móti jarðklettinum og at eitt triðja stóð innanfyri hann og allan vegin niðan við tí eystara skinninum. Men, sum fyrr er greitt frá, eru prógv fyri, at hús VII eru inndottin og hava ligið opin í nakað langa tíð og haraftrat kemur, at henda innasta, vestasta laðing vísti seg at standa oman á áður umtalaða vesturpalli; hon má tí vera laðað aftaná at niðaru

húsini vóru inndottin og má vera vestari veggur á húsum, sum eru bygd á og innanfyri veggirnar í húsum VII og VIII. Hesin veggur endar innanfyri jarðklettin í horni og lítlari leivd av suðurveggi; miðjan av honum er burtur, men hann finnst aftur yviri við eysturveggin á høllini og í støðum eisini omaná honum. Suðurendin á hesi toft er tí greiður, men ymist er hvussu langur vesturveggurin er niðaneftir; hann stendur omaná norðurveggi hallarinnar og hómast í beninum undir akveginum.

Vit kunna kortini siga vist, at hetta vóru sethús; í øskublandaðum sandgólvi stóð óreglulig rúgva av brostnum steinum og øsku, sum er samandottin eldstaður (eldstaður 1), og ymsar staðir í gólvinum lógu brot av amboðum og búnýtum. Væl kann tað vera, at summir smástólparnir, vit umrøddu í sambandi við hús VII hoyra til hesa toft, serliga teir sunnastu, ið standa tvørturum toftalendið (sí: 3. mynd).

Eisini hesi hús eru inndottin og hava ligið leingi sum toft. Ymiskt tjúkk mosa-, lyng- og graslind skilir millum hesa flógv og ta ovaru. Í henni lógu nógv træsprek, av teimum vóru summi telgd spísk í øðrum enda og lógu á rað við lynggreinum millum; rímiligast er at fata tey sum sprytur at festa tekjufløgini, mønufløgini, við — *at spryta tøk* — vita menn enn um at siga.

Gripir í húsum V

1. *Brýni;* úr glitur- og leirskifuri; á einum sæst skilliga, at tað er knívabrýni hjá lámi; 6,5–14,4 cm long.
2. *Handsnældurennil;* úr fitisteini; flatur undir niðan, høgt árundur omaná, tvørmát 2,9 cm, hædd 1,9 cm.
3. *Fitisteinsbrot;* smá, 2,8 cm tjúkk; eitt við 2 boraðum holum.
4. *Træílát;* fleiri laggaðir stavir og botn- og lokfjalir við ymsum skøvum; einstakir eru oyrnastavir t. d. av lokadyllu.
5. *Træsprek;* meir og minni tilevnað; summi við holum í og trænøglum; eitt prýtt við skákskøvum.
6. *Træskaft;* runt, út við annan endan 2 cm vítt hol; 17 cm langt, 2,8 cm tjúkt.
7. *Knarvi;* eggklingrutur.

Hús IV, III, II, I. Sum *5. mynd* vísir eru, umframt toftirnar, ið vit hava hoyrt um, fleiri toftaleivdir í ovaru flógv. Tann, ið nevnd er hús IV, hevur 1 m tjúkkan tvílaðaðan norðurvegg, og tó at síðuveggirnir eru svikaligir, geva teir kortini hóming av byggilagnum. Tað og ein *borðskeyti,* sum funnin var í hesi flógv, ið helst er tann sama sum *bátaborðini* vórðu funnin í í 1957 (sí bls. 120), gera, at vit mega halda hetta hava verið neyst.

Verri er við garðsløðunum III og II; tó at III er ferhyrnt og gólvkent var í botninum, man tað kortini helst vera partur av hvanngarði. Báðar grótlaðingarnar II niðan úr húsum I eru óivað 0,77 m høgir, einlaðaðir veggir, ið annaðhvørt eru partar av I, ella heldur leivdir av yngri úthúsum, (hoygørðum?) Hús I er harafturímóti greiðari og skilliga yngst. Tað vendir mest sum eystur og vestur; av tí eru útgrivnar 5,5 m, men ivaleyst er, at tað røkkur longur eystur. Meginparturin av suðurvegginum er fyribeindur, tá ið grundin varð grivin í 1957, bara útsynningshornið stendur so dánt laðað inn móti jarðklettinum. Haðan fer tann 2,9 m langi, 0,5 m høgi, o. u. 1 m tjúkki vesturveggurin niðan í útnyrðingshornið, ið stendur væl uppi, o. u. 0,4 m høgt. Allur hesin veggur er settur inn í og á vesturvegg hallarinnar. Innsíðurnar á hesum veggi eins og á norðurvegginum eru greiðar, harafturímóti eru útsíðurnar ivasamar. Ilt er at siga vist, um veggirnir vóru tvílaðaðir, sum í støðum sýnist, ella um bakið bara hevur verið laðað nakað upp og annars verið flagveggur. Rættuligir ífyllingarveggir eru teir ikki, men ífylling, mold og smágrót er kortini nýtt millum innastu laðing og ytru baking.

Alt gólvið er vandaliga steinsett við malargróti, og, eftir miðjuni, við heldur stórum hellum + 2,16 + 2,25 m, *6. mynd.*

Frásøgn er, at bóndahús stóðu *á Oyrini* til fyri o. u. 150 árum síðan; einki er til hindurs fyri, at hetta er vestari partur av teimum, trúligast fjósið, sum menn hava vandað sær um at steinseta og at gera tætt og lýtt. Niðri í steinsetingini varð funnin ein

Gripur

Leirílátsbrot; brúnglarað innan og uttan, ruflut øðrumegin; 5,5× 4×1,7 cm.

ÚRSLIT

Eina ferð í forðum leita menn sær eftir hóskandi stað at seta hús síni á. Teir finna tað á fløtti niðan frá stórari oyri eystanfyri *Gjógvará.* Frá áarbakkanum hækkar lendið niðan í rygg millum tveir stórar jarðklettar og lækkar aftur haðan eystureftir. Teir avráða at seta vestara vegg á ryggin og nýta part av honum sum grundarlag undir palli. Amboð hava teir bæði at máta og at seta tað bogaða støðið við, og meira enn, teir kenna luftfallið millum øll tey ymsu mát, ið eini hús skuldu hava, tá á døgum. Nú verða tjúkkir ífyllingarveggir av bøllugróti og pallur innanfyri teir laðaðir. Av tí at lendið vestan- og norðanfyri er hægri enn inni í húsunum, setur vatn oman eftir gólvinum, teir noyðast tí at grava rennur, sum taktar verða við hellulok-um, oman gjøgnum og tvørturum øll húsini. Eisini gjøgnum túnið (norðanfyri hús VI) er tvørrenna løgd, helst tann sama sum kemur út undan vesturvegginum og haðan fer tvørtur gjøgnum alt gólvið í húsum VIII. Síðan reka teir tjúkkar stólpar niður í leirbotnin og kúga smágrót rundan um teir.

Prýðiligur langeldur, (eldstaður 4) verður laðaður eftir miðlinju húsanna har tey um miðjuna eru breiðast; og at enda sandur borin á alt gólvið. Stað at sita og sova á høvdu teir á pallum, rekkjum, fram við veggjunum. Um lívsháttt og lívskor teirra, er lítið at frætta; men ull áttu teir, fisk veiddu teir og handilssamband høvdu teir við grannalond. Tann 16—17 m langa høllin hevði verið stór hús eisini nú.

Sum tíðin gongur, verður meira og meira borið, drigið og mist á og í gólvið, ið veksur so mikið, at neyðugt



Svend Poulsen.

8. mynd. Ískorin fjøl; mynsturið strikað upp við hvítum. (hús VIII, 12), stødd o. u. 3:5.

Board with ribbon ornament (house VIII, 12), 3:5.

verður at hækka eldstaðin (upp í eldstað 3), og at enda laða heilt nýggjan eldstað, 2. Hesin seinasti man vera gjørdur í sambandi við umbygging av toftini innan, nú siður var komin at hava slætthøgdar stólpar, og kanska skilarúm og bróst. Leingi hava tey búð í hesum húsum, áðrenn tey av einihvørji orsøk rýma, ivaleyst í náðum, og taka alt heilt og virðismikið við sær. Tað ið funnið er, er mest brot av búnýtum og av leikum barna.

Húsini detta inn, mosi og gras krúpa inn eftir allari toftini; rúm tíð gongur; so kjósa seinri ættarlið sær hesar toftir at byggja á. Eisini hesi hús, V, falla av og aftur gongur heldur long tíð, til einhvør fær sær neyst upp her millum gamlar toftaveggir. Síðan hava menn bygt og virkað har til henda dag.

Svend Poulsen.

9. mynd. Vaðsteinur við íhøgdari mynd, (hús VIII, 17) stødd o. u. 1:2.

Linker with ribbon ornament (house VIII, 17), about 1:2.

Kortini veit eingin teirra um fyrstu búsetingarnar at siga, einki er staðarnavnið, eingin søgnin, ið vísir á leið.

Sama søgan sum í *Kvívík* og í *Tjørnuvík*, og helst sigur hon eisini her frá høgum aldri.

Lat vera, at í Fuglafirði ikki er brimpláss sum í Kvívík; kortini høvdu menn her nú á døgum neyvan sett so niðarlaga og so lágt, o. u. 1,5 m yvir sjóvarmálan.

Líkskapurin millum høllina í Kvívík og hesa í Fuglafirði er í øllum førum merkiliga stórur. Í báðum støðum eru høllirnar fallnar av og bygt er aftur á tær í eini tíð, sum ongar frásagnir ganga um. Báðar standa niðri við strondina, báðar venda N—S, báðar hava sama eggklingruta byggilag við ífyllingarveggjum, langeldi, við kullu, í miðjuni, stólpum, ið bera tekjuna, og um tað so er jarðklett í vesturveggi, so hava tær hann báðar næstan á sama stað.

Størsti munur er, at hin stendur vestanfyri, henda eystanfyri eina stóra á, og at fjós er vestanfyri høllina í Kvívík, her rúm, við eldstaði, bygt ájavnt og áfast við høllina.

Tað er hetta sum fram um alt ger henda fund forvitnisligan. Nú hava vit tvey samdømi um búsetingarsið og húsasmíð her hjá okkum í forðum, annað í Streymoy og annað í Eysturoy.

At gripasløgini eru mest sum tey somu økir sjálvsagt eisini fróðskap okkara um lívsháttin í fornari tíð her á landi. Næstan alt finnst í báðum støðum, bara eru leirílátabrotini nógv færri her, men tess meiri av kroti.

Rannsóknarúrslitini í Fuglafirði eru tí kærkomin viðbót til tey í Kvívík, fram um alt er nú vissa fingin fyri, hvussu endarnir vóru laðaðir og tekjan borin uppi.

TÍÐARFESTING

Ráð eru ikki fyri at tíðarfesta nakra av ovaru toftunum; greitt er tó, at hús V mega vera bygd nakað leingi aftaná at hús VII vóru inndottin. Nær ið hús VI eru bygd er ivasamt, helst kortini um somu tíð sum fólk búðu í húsum VII, og tað man vera einaferð í miðøld.

Fyri tíðarfesting av húsum VII til miðøld tala reystsíðað fitisteinsílát (VII,9)[4,8,14] og latínskur krossur í fitisteinsamboði (VII, 8). Heilt vist er ikki, um gripir, ið funnir eru á pallinum hoyra til hús VII ella VIII, t. d. tvífaldu bláu perlurnar (VIII, 18), sum meinlíkar eru teim silvurløgdu í Kvívík[3] (bls. 29), og sum allar helst skuldu verið víkingaaldarperlur. Hetta er okkum eykaávaring um at vera varnar við tíðarfesting av toftum. Tí sum áðar sagt, eru húsini VII og VIII í roynd og veru bara ymsar gólvfláarhæddir innanfyri somu veggir, ið hava lívt fólki langar tíðir uttan íhald. Gripir so sum perlur hava sjálvsagt verið goymdar sum gersemi og nýttar alla tíðina; eisini hava gomul búnýtasnið hildið sær óbroytt, t. d. trogið (VII, 11).

Spurningurin er nú, um niðasta gólvfláin, ella hús VIII, eigur nakað, ið kann prógva hana at vera eldri enn hinar. Summar perlurnar (VIII, 18) eru funnar her, tær og fiti-

steinsbollar (VIII, 2) áttu helst at sagt frá víkingaøld; aðrir gripir sum ískorna fjølin (VIII, 12; 8. mynd) og svørðsluturin (hús VIII, 11; 7. mynd), eru so illa farnir, at vitnisburður teirra er veikur. Kortini loyva fundsamanseting og ymis eyðkenni óivað at meta um aldur teirra.

Bandflættuverk, sum á fjølini, hevur verið nýtt heilt langt upp í tíðina eisini hjá okkum, men nú vit finna tað saman við nærskyldum bandknúti á vaðsteini (VIII, 17; 9, mynd), tora vit at bera saman við eins prýddar lutir í øðrum londum, Noregi[17], Íslandi[6], Grønlandi[16], har allir samsvarandi gripir, uttan fitisteinsplátan í Grønlandi (miðøld?), eru tíðarfestir til seinasta part av víkingaøld. Nú er at siga um skurðverkið á fjøl okkara, at tað ikki er valaverk, sí bls. 129; t. d. hevur maðurin í einum staði ikki lagt nóg mikið upp fyri klingruni niðast, við tí úrsliti at tvíbondini fløkjast. Hetta tykist tó løgið, tí annars er uppbyggingin klár og føst. Mistakið kundi kortini boðað frá, at hann hevur skorið eftir eldri fyrimynd, sum hann ikki var heilt kunnigur við.

Móti hesum mælir tó bandknúturin. Hevði maðurin verið bundin av fyrimynd, sum lá honum fjart, hevði hann neyvan givið lykkjum sínum á ferhyrndu fjølini spískar tungur út í fjalarhornini og høgt tær í vaðsteinin rundar, so at tær vakrari og liðiligari laga seg eftir eggklingruti umgerðini.

Afturat hesum kemur svørðsluturin, sum tó at flísar eru brotnaðar av báðum hjøltum, og brandurin er burtur, kortini minnir so nógv um svørð í L bólki hjá *Jan Petersen*[12], at vit hætta okkum at sammeta hann við tey; eisini tí, at í undirhjaltið á einum hansara, komnir úr Vestureuropa, funnum í Noregi[17], er skorið sama bandflætta sum á fjølini her.

Hetta er heildarsamanseting, sum illa slepst undan, og sum óivað noyðir okkum at halda gripir okkara vera frá seinast í víkingaøld ella fyrst í miðøld, o. u. 1000 árunum.

Stuðul undir hesi tíðarfesting er byggilag húsanna, ið,

sum vit hava hoyrt, er samdømi við Oma[13], Ísleifsstaðir[7], Trelleborg[11] og fyri alt tað Kvívík[3]. Hetta er byggiháttur, ið er eyðkendur víkingaøld[7] og ætlandi í víkingaøld kyknaður upp í Bretlandi ella á bretsku oyggjunum[11].

Nú er so, at helst eisini bandflættuverkið upprunaliga er komið haðan; tað finnst í Orknoyum, Suðuroyum og Man og ikki minst á mongd av írskum gripum[17]. Upprunin er keltiskur, men norðbúgvar hava tíðliga ognað sær tað so mikið, at rættast man vera at nevna tað keltisktnorrønt. *Kristján Eldjárn*[6], heldur tó, at tað eisini kann vera runnið av norrønari rót, av Borrestílinum; men vestanhavsdámur er nú kortini á tí. Hvørt sum er, skakar hetta ikki ætlaðu tíðarfesting okkara, heldur tvørturímóti.

Alt hetta borið saman við vissa skotsk-keltiska valknútin á Tjørnuvíkar-ringpróninum[5] og úrslitini av málsligu rannsóknum *Chr. Matras'*[9] ber vissiliga í tað borð, at eisini her er samband, helst skyldskapur, við norrønu bygdaløgini fyri sunnan hav.

SUMMARY

In the summer of 1958, in a place called «*heima á Oyrini*», *Fuglafjørður* (Eysturoy), on the shore in the bottom of the fiord (fig. 1), was excavated the remains of an ancient settling below various strata of later buildings (figs. 5 and 6).

Of the sites in the lowest stratum (houses VIII and VII), which are in reality the same house representing a long period of building, 10 m of the long side (inside measurement) are left. The house, oriented N—S, is built of curved filling walls, 1.25—1.5 m thick, with straight cut ends, a fireplace in the middle of the floor in the longitudinal axis of the house, earthen benches along the inside of the walls, and a roof supported by posts (figs. 2 and 3). The proportionals between the breadth in the middle, 5.35 m, at the end wall, 3 m, the estimated original length, 16—17 m, and similar measurements in house in Trelleborg[11] and Kvívík[3] correspond intimately.

Although this type of house, the Hall, is regarded as the Scandinavian house of the viking period[7], and there are now 2 almost identical specimens in the Faroes[3], it is not expedient, without further proof, to make use of the type as a basis for dating, the more so because in this house we have proofs fairly positive that the same building was used permanently for rather a long period, which even the difference in level of about 0.3–0.4 m between the floor and fireplaces seems to show. In the floor level of house VII there is a longfire, 3.5 m in length, 0.5–0.9 m across (fig. 3 and fig. 4; No. 2), below it a fireplace, 2.2 m long, 0.75 m across (fig. 4; No. 3), above a longfire, 4.75 m in length, 0.65–0.75 m across, with an ash-pit in the middle, belonging to house VIII (fig. 2 and fig. 4, No. 4).

As an addition and parallel to the west wall there is a room, 5.5 m long, with a broad fireplace, 2.25 m long, 0.75 m across, and a pitched floor, which owing to special circumstances has been only partly examined (house VI).

The archaeological finds are so common and their condition of preservation so poor that they are difficult to date exactly. All the same vessels of soapstone[8] with perpendicular sides (house VII, 9) and tools with Latin crosses cut in (house VII, 8) seem to speak for a dating to somewhere in the Middle Ages. The circumstances of finding contradict rather distinctly a later dating.

Of finds in house VIII pointing towards an earlier dating the following are to be pointed out: Bowl-shaped vessels of soapstone, of these 1 or 2 similar finds in e. g. Trelleborg[11], pl. XVII, 2, (house, VIII, 2); yellow, blue, and green glass beads (house VIII, 18), see Kvívík[3], p. 29, fig. 12.; moreover, board with ribbon ornament (hous VIII, 12), fig. 8; sinker with ribbon ornament (house VIII, 17), fig. 9; most likely hilt of toy sword (house VIII, 11), fig. 7. Although the ribbon motifs were used for a very long time, partly in this country too, the circumstances of finding and composition of finds compel to an early dating, most likely the beginning of the Middle Ages.

The ribbon motifs, in all probability originally Celtic-Norse[6,12,16,17] together with the characteristic type of house,[7,11,13] indicate contact with the British Isles, or direct settling from there, a circumstance to which the results of the linguistic studies of Chr. Matras[9] and the brooch with ribbon ornament from Tjørnuvík[5] bear witness.

On the whole, this investigation is a valuable supplement to the results at Kvívík[3].

BÓKMENTIR

1. *Brøgger, A. W.:* Den norske bosetningen på Shetland—Orknöyene. Oslo 1930.
2. *Brøgger, A. W.:* Løgtingssøga Føroya I. Tórshavn 1937, bls. 14.
3. *Dahl, Sverri:* Fornar toftir í Kvívík. Heiðursrit til Rasmus Rasmussen á 80 ára føðingardegnum. Tórshavn 1951, bls. 1—32; mynd 12.
4. *Dahl, Sverri*: Um tíðarfesting av føroyskum fitisteinsfundum. Fróðskaparrit, 4. bók, Tórshavn 1955, bls. 77.
5. *Dahl, Sverri* og *J. Rasmussen:* Víkingaaldargrøv í Tjørnuvík. Fróðskaparrit, 5. bók, Tórshavn 1956, bls. 164 f.
6. *Eldjárn, Kristján*: Kuml og haugfè úr heiðnum sið á Íslandi. Reykjavík 1956, bls. 324, mynd 142.
7. Forntida gårdar i Island. København 1943, bls. 145 f, mynd 97 og 104; bls. 193 f.
8. *Grieg, Sigurd:* Middelalderske Byfund fra Bergen og Oslo. Oslo 1933, bls. 206.
9. *Matras, Chr.:* Gammelfærøsk *ærgi.* Namn och Bygd, Uppsala 1956, bls. 51—67.
og Fróðskaparrit 3—6 bók, Tórshavn 1954—1957.
10. *Nørlund, Poul* og *M. Stenberger*: Brattahlid. Meddelelser om Grønland, Bd. 88 nr. 1, København 1934, bls. 120, mynd 80.
11. *Nørlund, Poul:* Trelleborg. København 1948, bls. 86 f; talva XVII, 2.
12. *Petersen, Jan*: De norske vikingesverd. Kristiania 1919, myndir 94 og 95.
13. *Petersen, Jan:* Gamle gårdsanlegg i Rogaland, Oslo 1933, bls. 66 og talva LIII.
14. *Petersen, Jan:* Vikingetidens redskaber. Oslo 1951, bls. 349 f; bls. 359, mynd 196; bls. 297, mynd 159.
15. *Rasmussen, Jóannes:* sí Dahl, Sverri, nr. 5.
16. *Roussell, Aage*: Sandnes and the Neighbouring Farms. Meddelelser om Grønland, Bd. 88, nr. 2, København 1936, bls. 132, mynd 119; bls. 136, mynd 122; bls. 152, mynd 146.
17. Viking Antiquities, part V. Oslo 1940, bls. 123, mynd 123; bls. 18, mynd 5.